# *Samandráttur av Bygdaráðsfundi 23.06.2014*

**Bygdaráðsfundur  23.06.2014  kl. 17.00 til kl. 19.10**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarhøli | |
| Hjástødd: | Jóhannus Danielsen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Niclas Davidsen | x |
| | Mortan Højgaard | x |
| | Jákup Olsen | x |
| | Súnfríð Jacobsen | x |
| | Marjun Gaardbo, skrivari | x |

**Til viðgerðar:**

**Mál nr. 69/2014 Fíggjarmál**
J.nr. 2013-0011-0034
**Málslýsing**
Hin 05.06.2014 kom roknskapurin fyri 2013 hjá Kongshavnar havn til ummælis hjá Nes kommunu.

**Tilmælið**
Á fundi 17.06.2014 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við roknskapinum soleiðis, sum hann er uppsettur.

Súni í Hjøllum, formaður í Kongshavnar Havn, var úti meðan málið var viðgjørt.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

Súni í Hjøllum, formaður í Kongshavnar Havn, var úti meðan málið var viðgjørt.

**Mál nr. 70/2014 Fíggjarmál**
J.nr.2012-0031-0132
**Málslýsing**
Í sambandi við, at eldraøkið verður yvirtikið, skal avgerð takast um, hvørjar KT loysnir skulu brúkast. Almannaráðið hevur gjørt eitt uppskot til samlaðan pakka av KT loysnum, sum landið hevur nýtt til eldraøkið, og sum kommunurnar nú kunnu yvirtaka.

**Tilmælið**
Á fundi 17.06.2014  mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við uppskotinum, til ein samlaðan pakka av KT loysnum, sum landið hevur nýtt til eldraøkið.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 71/2014 Fíggjarmál**
J.nr. 2012-0031-0132
**Málslýsing**
Í sambandi við yvirtøku av eldraøkinum, hava kommununar í Skálafjarðar samstarvinum sett ein samskipara í starv. Samskiparin er komin við einum fíggjaryvirliti, sum er ein meting av útreiðslum til yvirtøkuna av eldraøkinum, frá 1. juni 2014 – 31. desembur 2014.

Samlaði kostnaðurin er kr. 530.414,00, býtið millum kommunurnar er eftir fólkatalinum, og er parturin hjá Nes kommunu kr. 109.600,00, svarandi til 20,66 %.

**Tilmælið**
Á fundi 17.06.2014 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við fíggjaryvirlitinum frá samskiparanum, og at peningurin verður tikin av stovninum Barnavernd.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var eimælt samtykt.

**Mál nr. 72/2014 Fíggjarmál**
J.nr.2014-0015-0017
**Málslýsing**
Nýtt felag hevur ætlanir um at keypa høllina á matr. nr. 435i á havnalagnum. Økið verður at nýta sum grundstykki til goymsluhøll til pakkatilfar s.s. timbur, plattar, papp og líknandi umframt at framleiða egnar loysnir innanfyri virksemið, ið samband við hetta. Bygningurin er 468m², og uttanumøkið er 1021m² til støddar, í alt 1489m².

Leigusáttmálin hjá fyrrverandi eigara gongur ikki út fyrrenn í novembur 2025. Nýggi eigarin ynskir at gera nýggjan leigusáttmála við Nes kommunu.

**Tilmælið**
Á fundi 17.06.2014 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við, at nýggjur sáttmáli verður gjørdur við nýggja eigaran av matr. nr. 435i.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

# *Samandráttur av Bygdaráðsfundi 23.06.2014*

**Mál nr. 73/2014 Byggimál**

J.nr. 2014-0042-0333

**Málslýsing**

Í skrivi 21.05.2014 søkir Kristian Poulsen um graviloyvi til útbygging av sethúsum á matr. nr. 426 á Brekkuvegi 1.

Eisini søkir Kristian Poulsen um, at sleppa at keypa 130m² burtur av matr. nr. 415a til samanleggingar við matr. nr. 426 sum er 375m².

**Tilmælið**

Á fundi 10.06.2014 mælir Tekniska nevnd til at játta graviloyvið, og boða Kristiani Poulsen frá, at neyðugt er at ogna sær grundstykkið, áðrenn graviloyvið kann verða útskrivað.

**Avgerð**

Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr.74/2014 Byggimál**

J.nr.2014-0042-0331

**Málslýsing**

Í skrivi 02.06.2014 søkja Emma Maria og Martin Ove Hentze um graviloyvi og byggiloyvi til sethús á matr. nr. 699aø á Gaddavegnum.

**Tilmælið**

Á fundi 10.06.2014 mælir Tekniska nevnd til at játta graviloyvið og byggiloyvið eftir vanligum treytum.

**Avgerð**

Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 75/2014 Vegamál**

J.nr.2014-0044-0073

**Málslýsing**

Frá Gaddavegnum og norður til sethúsini á matr. nr. 655a er ein vegastubbi á 80 m, sum ikki er asfalteraður. Í teir norðastu 40 m eru allar leiðingar lagdar, meðan teir 40 m norður frá svinginum ikki eru gjørdir.

Arbeiðið, sum eftir er at gera soleiðis, at vegurin verður liðugur er:

1. Planera frá svinginum, umleið 40 m norður, tað verður í høvuðsheitum uppgrevstur og uppfylling av nýggjum tilfari.
2. Regnvatnsristir við tilhoyrandi brunnum og leiðingum.
3. Tvørrennu í vegin við st. 30
4. Asfaltering frá svinginum og norð til markið matr. nr. 655a, umleið 75 m

Kostnaðarmeting fyri planering og regnvatnsleiðingar pkt. 1-3 er kr. 100.000,00 u/mvg og fyri asfaltering (uttan kantsteinar) kr. 180.000,00 u/mvg, tilsamans kr. 280.000,00 u/mvg.

**Tilmælir**
Á fundi 10.06.2014 mælir Tekniska nevnd til, at vegurin, uppá umleið 40m norðureftir, og har kostnaðarmetingin er kr. 100.000,00 u/mvg, verður gjørdur liðugur, áðrenn hann kann asfalterast.

Á fundi 17.06.2014 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd, at vegurin, har kostnaðarmetingin er kr. 100.000,00 u/mvg, verður gjørdur, og at peningurin verður tikin av stovninum Havnin.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**<u>Mál nr. 76/2014 Ymiskt</u>**
<u>J.nr.2014-0003-0030</u>
**Málslýsing**
Kommunan hevur fingið fleiri fyrispurningar frá ungum fólki um arbeiðið í summarfrítíðini.

Í 2012 skipaði Nes kommuna fyri Ung í Arbeiði, fyri 9. floks næmingum. Í 2013 vóru fleiri ung í arbeiði hjá kommunun, og skipaði tekniski leiðarin soleiðis fyri, at øll fingu arbeiðið, og fingu tey 14 dagar hvør. Flestu teirra gingu í 9. flokki.

**Tilmælir**
Á fundi 10.06.2014 mælir Tekniska nevnd til at geva teimum sum ganga í 9. flokki arbeiði í summar, og at tekniski leiðarin samskipar arbeiðið.

Á fundi 17.06.2014 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd, at tey ungu fáa 14 dagar hvør, og at peningurin verður tikin av umvæling og viðlíkahald á teimum ymisku stovnunum.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.